# Heystskrá hjá Synergi

*Førleikamenning gevur føroyska samfelagnum íblástur og meirvitan. Vit fáa eitt betri samfelag, betri fyritøkur og glaðari og meiri eldhuga starvsfólk. Hetta eru vit hjá Synergi glaðar at vera ein partur av og bjóða nú tær við. Vel tær eina spennandi útbúgving ella eitt supergott skeið til heystar og ver vælkomin til tiltøk okkara!*

16. september 2010 - 2-daga skeið

## At leiða onnur uttan at vera leiðari

Hetta er eitt super skeið til tín. sum situr sum verkætlanarleiðari, av og á avloysir leiðaran ella kanska hevur ábyrgdina fyri einum serligum arbeiðsøki. Tú leiðir, men ert ikki sett/-ur leiðari. Gjøgnum tveir lærurikar dagar fært tú gjøgnum fakliga vitan og ítøkilig amboð eitt haldgott tak um persónligu leiðsluna.

23. september 2010 - 2-daga skeið

## Excel I - tey fyrstu fetini

Situr tú enn við roknimaskinuni og hyggur eitt sindur øvundsjúk/ur eftir teimum, sum bara tasta alt inn á Excel og vupti, so er úrslitið klárt? Ella brúkar og hevur tú kanska brúkt Excel í minni mun, men kundi hugsa tær at lært forritið heilt frá grundini? Kom á 2-daga skeið saman við tínum líkum og fá Excel-dreymin uppfyltan;-). Skeiðið hevur fingið heili 10,25 í miðal eftir 13'skalainum.

28. september 2010 - 2-daga skeið

## Økonomi fyri ikki-økonomar

Tú situr kanska við fíggjarligari ábyrgd í tínum arbeiði, og kortini tørvar tær betri fatan av fíggjarligu samanhangunum á arbeiðsplássinum. So er hetta skeiðið fyri teg! Gjøgnum báðar skeiðsdagarnar verður títt innlit í fíggjarstýring og fíggjarætlanir ment, og tú verður kunnug/-ur við grundleggjandi orðingar og meginreglur í búskapi. Seinast fekk skeiðið heili 10,2 í miðal eftir 13'skalainum.

30. september 2010 - 1-dags skeið

## Framløguteknikkur

Skalt tú ofta ella av og á hava framløgur fyri eini fjøld? Fyri nevnd, stjórn, leiðslu, starvsfeløgum, almenninginum ella øðrum? So er tað nú, tú hevur møguleikan at betra um førleikan og harvið kenna teg tryggari, tá tú skalt leggja fram. Skeiðleiðarin hevur skriva fleiri bøkur um evni og er m.a. kendur journalistur frá TV2. Sagt seinast: "Hetta skeið kann snøgt sagt ikki verða betri".

4. oktober 2010 - 2-daga skeið

## Professionelt nevndararbeiði v/Søren Brandi

Skeiðið er gjørt til nevndarlimir og leiðarar, sum vilja menna og styrkja teirra førleikar á økjum innan leiðslu og strategi. Fokus verður sett á grundleggjandi leiðslu í nevndararbeiði – eitt nú hvussu nevndin definerar og arbeiðir við góðari fyritøkuleiðslu. Harumframt eisini fokus á vaksandi leiklutin hjá leiðsluni/nevndini í mun til strategiarbeiði í fyritøkuni. Skeiðið er viðmælt okkum av einum føroyingi, sum gav skeiðinum allarbestu skoðsmál og segði at allir nevndarlimir áttu at luttikið.

6. oktober 2010 - 7. apríl 2011

## Útbúgving fyri samskiparar, skrivarar og hjálparfólk

Fá eina serliga og persónliga útbúgvingartilgongd, har brennidepilin er settur á teg og tína persónligu og fakligu menning. Tú verður betur búgvin og víðariment/-ur innan mest viðkomandi økini í tínum starvi. Tú verður styrkt/-ur sum sparringspartnari hjá bæði stjóra, deildarleiðara og starvsfeløgum. Ert tú samskipari, hjálparfólk, skrivtovufulltrúi, móttøkufólk, skrivari (lækna-, advokat-, verkætlanar-, leiðslu- og skúlaskrivari) so er hendan útbúgving fyri teg.

8. oktober 2010 - 1-dags skeið

## Soleiðis handfer tú trupul fólk

Hetta er eitt tað besta skeiðið hjá okkara samstarvsfelaga - Confex Danmark - og seinast fekk skeiðið heili 10,0 í miðal eftir 13'skalainum í Føroyum.

Summi eru trupul í eina tíð, onnur eru tað bara altíð – felags eyðkenni fyri bæði sløgini er, at tey stjala tíðina hjá tær og í kjalarvørrinum er frustratión, inneffektivitetur, illsinni og øsing. Tú sleppir ongantíð undan hesum fólkunum, men tú kanst menna tíni evni at handfara tey jaligt, so tú sleppir undan at tey brúka alla tína orku og oyðileggja góða lagið.

2. november 2010 - 3 Modul á 1 dag

## HR-løgfrøði fyri allar leiðarar

Vit eru sera glaðar um at kunna bjóða tær eina HR løgfrøðiútbúgving um føroysk starvsfólkaviðurskifti. Undirvísarin er Sigmund Poulsen, ið er tann løgfrøðingurin í Føroyum, sum veit allarmest um løgfrøðiliga partin av starvsfólkaviðurskiftum - bæði frá arbeiðsgevara og arbeiðstakara síðu.

Hetta er ein útbúgving, til allar leiðarar við starvsfólkaábyrgd umframt starvsfólk á starvsfólkadeildum. Vit koma inn á flestar løgfrøðiligar spurningar, ið kunnu stinga seg upp í starvsfólkamálum. Líka frá setan, lønarágóðar, frítíðarlóg, kappingaravmarkandi ásetingar, verja av vitanini í fyritøkuni, KT-politikk, tagnarskyldu og talufrælsi, sjúkrafráveru, uppsagnir osfr. osfr. Skeiðið fer veruliga at gera teg føran fyri at taka rættar avgerðir í tíðandi starvsfólkamálum.

11. november 2010 - 1-dags skeið

## Starvsfólkahandbókin

Nú bjóða vit aftur hetta sera vælumtókta skeið út um uppbygging av eini starvsfólkahondbók. Kom og fá nakrar leiðbeinandi reglar, ið hjálpa tykkum og stuðla undir framtíðarætlanunum hjá fyritøkuni. Reglar, ið bæði tú og starvsfólkini eru glað fyri. Øll fáa ein geyma við heim, við einari fullfíggjari starvsfólkahandbók á, sum er klár at rætta til og seta í verk á tykkara arbeiðsplássi. Kom á skeið og spar eina rúgvu av tíð í tilgongdini at menna eina starvsfólkahandbók.

17. november 2010 - 2-daga skeið

## Skeið fyri húsavørðin

Øll vita, hvør húsavørðurin er, men eingin veit, hvat tú nágreiniliga kanst hjálpa við, og øll halda, at tú kanst gera alt í senn. Kennir tú hetta aftur? Øll hava eina meining um, hvørjar uppgávur húsavørðurin ger, og hvat tú við tínum ábyrgdarøki skalt gera fyri tey. Men hvussu nógv síggja tað arbeiði, sum tú gert? Vit hava sett saman eitt skeið við fokus á júst tín gerandisdag. Tú fært tveir motiverandi og mennandi dagar, fyltir við nýggjum førleikum, orku og humor. Hetta er eitt skeið fyri teg, sum arbeiðir sum húsavørður ella á einari byggideild. Tú lærir um at arbeiða meira effektivt, við m.a. íblástri frá ítróttinum, at menna teg í leiklutinum sum týðandi starvsfólk, seta mørk og at handfara truplar persónar og samrøður.

*Vælkomin til tiltøk hjá Synergi!*



Synergi

*Ps. Ert tú arbeiðstøk/-ur hevur tú møguleika at søkja ALS um at luttaka. Les annars alt um útbúgvingarnar og skeiðini á www.synergi.fo ella slá uppá tráðin. Vit svara fegnar spurningum á tel. 322 355. Tú kanst eisini senda okkum ein teldupost á synergi@synergi.fo.*

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn - www.synergi.fo - Tel. 32BELL (322 355) - synergi@synergi.fo